# Innbjóðing til móttøku



### í sambandi við stjóraskifti

Mánadagin 24. september kl. 15 til 17 verður almenn móttøka í Høllini í Hotel Hafnia í sambandi við, at Jón Kragesteen fer úr starvi og Sølvi Reinert Hansen tekur við stjórastarvinum.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**

# Netfrøðingur

Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum sóknast eftir samskiftisfólki við tekniskum innliti í heimasíðuskipanir.

Starvið fevnir um samskipan og menning av nýggju heimasíðu stovnsins og gerð av kunningartilfari í hesum sambandi. Harafturat fer samskiparin at arbeiða við vanligum kunningar- og fyrisitingar-málum.

Um tú verður okkara samskiftisfólk, fert tú at samskipa øll kunningartiltøk hjá Fróðskaparsetri Føroya, og tín ávirkan á uppgávur og arbeiðsumhvørvið er proportional við tína fakligu barlast og pondus.

Vit ímynda okkum, at tú fakliga hevur eina bakgrund í marknaðarføring og/ella samskifti. Royndir og førleiki við Typo3 ella øðrum líknandi skipanum er ein stórur fyrimunur. Men hinvegin, klárar tú at sannføra okkum um, at tú ert tann rætti persónurin til stóru uppgávuna, eru vit sinnað at lata teg royna.

Talan er um fulltíðarstarv frá 1. desember ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir eru sambært avtalu við Lønardeildina og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðsplássið frá Anniku Sølvará á tel. 352504 ella á ***annikas@setur.fo***

Umsókn, við viðkomandi skjølum, ið skulu verða okkum í hendi innan 12. oktober, skulu sendast til

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
Att.: Annika Sølvará
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn

***ella til annikas@setur.fo***

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

TEAM85

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið í Pætursgøtu 3 í Hoyvík

Pedagogur søkist til Sambýlið í Pætursgøtu 3. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv til setan frá 15. oktober 2007 til 30. september 2008.

Í Sambýlinum búgva 4 menn við diagnosuni Asberger syndrom. Til hetta brek verður brúktur ein skipaður arbeiðsháttur. Umsøkjarar, ið hava royndir við arbeiði av hesum slag hava fyrimun. Ítróttur er ein partur av arbeiðinum. M.a. renning, gongutúrar og svimjing. Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum eru at taka sær av íbúgvunum og øllum øðrum arbeiði í heiminum.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í farloyvisstarvið, heldur tænastumannasetanin fram. Um ongin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki.

Setanarøkið er Nærverkið við fyribils tænastustaði í Sambýlinum í Pætursgøtu 3.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarar hava fakliga vitan og hava góð samstarvs- og innlivingarevni

Nærri fæst at vita um starvið frá Annu Johannesen, leiðara á telefon 215540.

Umsóknir skulu sendast til:

Sambýlið í Pætursgøtu 3
Stílað: Anna Johannesen
Pætursgøta 3
FO188 Hoyvík.

**Umsóknarfreist: 5. oktober 2007.**

Trivnaðartænastan

## Tveir pedagogar til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi í Runavík til setan frá 15. oktober 2007.

**Setanarviðurskifti:**
Størvini vera sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um ongin pedagogur søkir, verða størvini sett við hjálparfólki.

Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Sambýlið og Bústovnurin á Rúnarvegi í Runavík.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði. Vikuskiftisarbeiði er 3. hvørt vikuskifti.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Bústovnurin á Rúnarvegi 6
620 Runavík
Stílað: Oddfríða Højgaard, leiðara

**Umsóknarfreist: 08.10.2007**

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Bústovnin á Eirargarði 16A-16BN

Søkt verður eftir pedagogi til setan 1. november 2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið sett/ur verður, er likamliga væl fyri og er áhugað/ur í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Harafturat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera før/ førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Løn- og setunartreytir:**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Um ongin pedagogur søkir, verður starvið sett við hjálparfólki.

Setanarøkið er Nærverkið og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum á Eirargarði 16 A/BN.

Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 31.5422 ella 315423.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Bústovnurin á Eirargari 16 A/BN
FO-100 Tórshavn
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreist: 15.oktober 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo